# REGLUGERÐ

## um endurgjøld fyri stuðlamúr og garð móti kommunalum vegi

### § 1

Tað er tekniska nevnd saman við fíggjarnevnd kommununar, sum umsitir hesa "reglugerð".

### § 2

**Stk. 1.** Tá ið kommunalur vegur er hægri enn lendið, eitt nú tá sethús standa niðan fyri veg og fráleiki til sethús er soleiðis, at neyðugt verður at gera stuðlamúr móti vegnum, fyri at túnið rundan um húsini kann verða 2,5 metrar í breidd mált frá húsavegginum, kann arbeiðið verða framskundað á tann hátt, at ánari av eini ogn, sum lýkur krøvini, sjálvur kann gera arbeiðið.

**Stk. 2.** Viðkomandi kann eftir skrivliga umsókn verða veitt endurgjald svarandi til gjald pr. m3 fyri betong + møguligt jarn, somuleiðis sum talan kann verða um at fáa arbeiðsløn ella partvísa endurgoldna, men skal avgerð verða tikin um endurgjaldið í hvørjum einstøkum føri, áðrenn eitt tílíkt arbeiði verður sett í verk.

**Stk. 3.** Stuðlamúrurin skal verða gjørdur í ta hædd, sum ein linja við halli 1:1 frá lidnum vegkanti – ætlað breiðkan og regulering íroknað, sker eina lodrætta linju 2,5 metrar frá húsavegginum, og støðið í múrinum er í kotu 0,6 m. undir gólvinum í stovuhæddini.

**Stk. 4.** Dimensjónir og hæddir skulu verða góðkendar av teknisku deild.

**Stk. 5.** Tekniska deildin skal koma við sínum tilmæli til nevndirnar um kostnað av byggingini, og skal ein niðurstøða verða gjørd, áðrenn peningur fyri tilfar og ella arbeiði verður útgoldin úr kommunukassanum.

### § 3

**Stk. 1.** Tá ið kommunalur vegur er lægri enn lendið, tá hús standa oman fyri veg, ella at vegur ella gongubreyt er við síðuna av húsum, eitt nú í útstykkingum, og ánarin av ognini ger garð móti vegnum, tá kann hann fáa endurgoldið fyri m3 + betong, sum er neyðugt til ein betonggarð upp til 120 x 20 cm.

**Stk. 2.** Talan kann eisini verða um at fáa møguliga arbeiðsløn ella partvísa endurgoldna men skal avgerð verða tikin um endurgjaldið í hvørjum einstøkum føri, áðrenn eitt tílíkt arbeiði verður sett í verk.

**Stk. 3.** Tekniska deildin skal koma við sínum tilmæli til nevndirnar um kostnað av byggingini, áðrenn nøkur niðurstøða verður gjørd og møguligt

endurgjald fyri tilfar og ella arbeiði verður útgoldin úr kommunukassanum.

§ 4

Goldið verður bert fyri gjørd og góðkend arbeiði.

§ 5

Endurgjald verður bert latið ta einu ferðina.

§ 6

Møgulig ivamál verða at leggja fyri býráðið til avgerðar.

§ 7

Henda reglugerð kemur í gildi frá 1. juli 2004

§ 8

Við hesum fer reglugerðin, seinast broytt 16. mars 1992 úr gildi.

§ 9

§ 3, stk. 1 er broytt av býráðnum tann 04. mei 2005.

Uppruna reglugerðin er góðkend av býráðnum á fundi 28. august 2004.

***Fuglafjarðar býráð***